# Fyll lívið við góð

**Sum so mong onnur, ger bispur sær eisini nakrar tankar um gerandisdagin, nú fíggjarkreppan er yvir okkum. Í síni karrieru sum prestur, virkaði hann tá kreppan í 1990 árunum gjørdi um seg, og livdi hann tætt upp at og sá hvussu kreppan oyðilegði menniskju. Ráðini til at brynja seg til nýggja kreppu, eru at fylla okkara lív við góðu virðunum. Á tann hátt kunnu vit gerast mótstøðuførari í svárum tíðum, metir bispur**



## Samrøða



Eilen Anthoniussen
eilen@sosialurin.fo

Tað kann tykjast tungt at vera til í dag, nú vit dagliga verða upplýst um avleiðingarnar av stóru fíggjarkreppuni, sum longu hevur gjørt mong arbeiðsleys, og fleiri kenna seg hótt av kreppuni. Rundanum okkum er bankaverðin ótrygg, og tos og gitingar um sparingar og uppsagnir hoyrast í hvørjum króki.

– Jú, kreppan merkist eisini her hjá okkum, heldur bispur. Sært tú, tað er týdningarmikið at hava fleiri bein at standa á. Eg havi í mong ár tikist við at finna út av hvat innihaldið í lívinum er, og hetta er eitt gott høvi at hugleiða eitt sindur um evnið. Eingin ivi er um, at høvuðsinnihaldið er lívið sjálvt, tí tað varðir alt lívið. Og lívið myndast av okkara familju og teimum, vit velja at liva saman við. Vit vita, at hákonjunkturur í búskapinum hevur vælferð við sær, og øvugt lækkar vælferðin, tá lágkonjunkturur er. Sjálvsagt ávirkar tað okkum. Men við at taka okkum av lívinum, og fylla tað við teimum góðu virðunum, kunnu vit tryggja okkum eina javnvág, sum ger okkum mótstøðufør í truplum tíðum, sigur Jógvan Fríðriksson, bispur.

Jú fleiri bein vit hava at standa á, betri útgjørd eru vit til myrkari tíðir. Og hesi beinini kunnu vera ymisk. Hevur ein bert tað fíggjarliga at missa, er tað skjótt at fella í fátt. Í staðin metir bispur, at mentanin her kann spæla ein týðandi leiklut. Til dømis kann kirkjan her koma at vera ein týðandi partur.

– Tað er vorðið so populistiskt at tosa um mentanarlig virðir. Men her meini eg ikki við ein sjónleik ella list, men við kirkjuna, sum skapar nakað, ið hevur varðandi virði. Og tey virðini kunnu vera hent fyri einstaka menniskjað, um kreppan fær fastatøkur.

### Kreppa broytir lív

Bispur veit hvat hann tosar um, tá hann tosar um menniskju í kreppu. Tá seinasta kreppa var í 1990 árunum, sá hann hvat kreppan gjørdi við fólk.

– Kreppan broytti mítt lív, líka sum hon broytti tey, hon rakti. Tá livdi eg tætt upp at fólki, ið mistu hús og heim, og vit mistu nógv fólk av landinum. Og enn í dag tosi eg við fólk, ið bera sjónlig arr frá tí kreppuni. Nógv av teimum, ið tá fóru av landinum, komu ikki aftur, og vit hoyra tey tosa um hvussu nógv prosent ikki koma heim aftur. Men í prædikuverðini er einki, sum eitur hagtøl. Eitt mist lív er eitt ov nógv, sigur bispur álvarsliga.

Kreppuna skal mann taka í álvara, tí enn vita vit ikki hvussu álvarslig hon verður.

Í ringum tíðum leita fólk sær í kirkjuna. Hvør er orsøkin til tað, veit bispur ikki. Møguliga er tað av neyð ella er tað mangulin upp á onnur tilboð, ið gera at fólk leita sær í kirkju.

– Tað skuldi verið óneyðugt at sagt, at øll eru vælkomin í kirkjuna. Men kirkjan má eisini kenna sína ábyrgd. Kirkjan skal ikki bert vera eitt plástur, men í staðin skal hon vera við til at lekja. Og styrkin hjá kirkjuni, er júst hetta meditativa, sum kann geva fólki eitt friðskjól, heldur Jógvan Fríðriksson, bispur.

Í júst hesi fíggjarkreppuni, eru øll sum ein tilvitað um støðuna. Tey við makt og kapitali líka so væl sum tey, ið lítið ella einki eiga. Vanligi borgarin sær seg kanska ikki vera føran fyri at gera so nógv annað, enn at sum frægast at breyðføða sær sjálvum og sínum. Men eina hond kann ein altíð rætta einum vini. Tendra eitt ljós.

– Eg minnist tá SEV í undanfarnu kreppu sløkti fyri streyminum. Tá hjálptust fólk at við at leiða olju millum hús, fingu oljufýringar í gongd, soleiðis at ongum nýttist at sita kaldur. Og tað er so nógv annað, mann kann gera. Lata mat ella geva burtur klæðir, ið ikki vera nýtt longur. Vit skulu ikki útiloka, at vit koma har til, at vit mugu taka ímóti vrakaðu klæðunum hjá grannanum, sigur bispur við einum smíli.

### Mugu yvirliva mentalt

Stórur missur og sorg eru fylgjur av eini umfatandi kreppu. Sorg er køvandi, og vit kunnu syrgja um nógv ymiskt. Til dømis er tað ein sorg at missa nakað, ein er góður við, eitt nú eitt arbeiði.

– Tað er ein sorg at fáa at vita, at tú verður send til hús av arbeiðsplássinum. Tú syrgir yvir at hava mist títt arbeiði, umhvørvið, tínar starvsfelagar. Og við hesum fer mist virði av tær sjálvum. Hví eg?, hevur tú hug at spyrja, og hví ikki síðukammeraturin?

Eitt, Jógvan Fríðriksson lærdi av undanfarnu kreppu, er at menniskja verður ikki tað sama eftir eina umfatandi kreppu. Tað er umráðandi í slíkari tíð, at mann ikki fer at leita eftir sekum ella situr inni við fjaldum hatri móti ríkum og vælbjargaðum, ið líka lítið kunnu gera við støðuna, men í staðin lærir seg at síggja møguleikar.

– Hóast tíðirnar vóru so ringar, sum tær vóru í 1990 árunum, sá eg heilar bygdir yvirliva mentalt. Stóra katastrofan í krepputíð, er um ein ikki yvirlivir mentalt. Tað kemur nógv upplýsing um kreppuna frá serfrøðingum til tann einstaka. Men vit mugu síggja støðuna innanífrá. Eg má síggja meg við egnum eygum, og síggja at eg dugi og kann nógv, hóast tað sær dapurt út.

### Lívið er nóg mikið

Bispur er eksistentialist, og

Sosialurin